# Ein varði í tjóðskaparligu menningini



*Jóan Pauli Joensen, professari og limur í Føroya Fróðskaparfelagi, helt á hátíðarhaldinum fyri 50 ára stovningardagin hjá felagnum røðu, har hann hugleiddi eitt sindur um søguna hjá felagnum og um týdningin, felagið hevur havt á føroyska samfelagið.*

**Røða hildin í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 25. oktober 2002**

*Jóan Pauli Joensen*

Tað er mær ein stórur heiður at verða biðin at halda røðu í sambandi við, at Føroya Fróðskaparfelag nú 17. desember verður fimti ár.

Eg var so heppin at vera millum teir studentar, sum sumrini 1967 og 68 savna inn lutir og frásagnir av manna munni ymsastaðni í Føroyum fyri Innsavningarnevnd Fróðskaparsetursins. Hetta kom eisini at hava stóra ávirkan á mína egnu lívsleið og á lívsstarv mítt.

Hetta var sama ár, sum nýggju seturshúsini, har Føroyamálsdeildin nú einsamøll heldur til, vórðu tikin í nýtslu. Satt at siga, hevði eg tá ikki rættiliga skil á, hvat var Fróðskaparsetur, Fornminnissavn ella Fróðskaparfelag. Alt var blandað saman hjá mær, sum hjá mongum øðrum. At Føroya Fróðskaparfelag var tað samlandi, kom eg at ásanna seinni

Í søguni hjá einum landi eru ymiskar hendingar, sum skara framúr. Jólafundurin var ein, men tað, at vit fingu eitt fróðskaparsetur í 1965, var eisini ein av varðunum í tjóðskaparligu menning okkara. Henda menning, ið byrjaði fyri aldarskiftið, skapti fyrst eina tjóðskaparliga mentan. Næsta og trjðja ættarliðið fóru eitt stig longri við at skapa føroysk vísindi og eitt føroyskt vísindaligt umhvørvi.

Hetta vóru eisini tankar, sum lógu til grund fyri byggingini av bókasavnshúsunum í 1932, og sum nú hýsa rektara og fyrisiting Fróðskaparseturs Føroya. Eini hús, sum í eitt mannaminni kom at verða ein mentanarmiðdepul í Føroyum og í dag eru sera væl egnaði til at mynda Fróðskaparsetrið sum stovn. Eini vøkur hús.

Tað, at nógvir føroyskir ungir akademikarar og studentar vóru avbyrgdir frá Føroyum øll krígsárini, styrkti sambandi teirra millum og gjørdi tað, at teir meira miðvíst fóru undir at skapa eitt vísindaligt umhvørvi í Føroyum, tá teir komu heimaftur. Hetta skal eisini síggjast í tí høpi, at Føroyar undir krígnum høvdu sítt egna bráðfengis stýrislag og at tað í stórum parti av fólkinum var eitt ynski um at stýra sær sjálvum. Føroyingar høvdu fingið eitt størri medvit um seg sjálvan, uttan mun til hvørja politiska fatan teir annars høvdu.

Tað vóru tí eisini í Føroyum fólk, sum dugdu at síggja virði í vísindum og gransking. Hans Andrias og konan Petra høvdu leingi sýnt vísindum og granskingararbeiði stóran ans, kanska serliga siðsøgu og fornfrøði. Tey áttu Sloans Hús, og seldu tey fyri at fáa pening til eini savnshús. Tey savnaði eisini saman annan pening til endamálið.

Í 1951 komu húsini úr Noreg, men umstøður vóru ikki til at fáa tey reist fyrr enn árið eftir í sambandi við tað stóru Landsframsýningina, sum Stig Rasmussen skipaði fyri. Í myndingin var tvey tjøldur í flugu upp.

Í Neystinum ella Bátahøllini komu Fornminnissavnið, Náttúrugripasavni og Føroya Fróðskaparfelag at halda til. Tað fyrstu tíðina helt Fróðskaparsetur Føroya eisini til á loftinum.

Hesi hús høvdu skapað eina vón, og tað var við vissuni um eitt tøkt arbeiðshøli í minnisstovu Hans Andrias Djurhuus, at teir báðir Jóannes Rasmussen og Hans Debes Joensen eitt óveðurskvøld í fyrra helmingi av desember í 1952 skrivaðu uppskot til lógir Føroya Fróðskaparfelags. Takpláturnar flugu um høvdið á Jóannes, tá hann á sín eyðkenda kvikliga hátt gekk ímillum heim sítt og landslæknahúsini í Sigmundargøtu, har teir skrivaðu lógirnar.

Teir høvdu longu skipað so fyri, at teir høvdu fingið eitt lið av monnum at skriva greinir í bók, ið skuldi koma at verða fyrsta nummar av Fróðskaparritum. Hesir greinskrivandi menn, tað vóru bert menn, gjørdist fyrstu limir í tí felag, sum varð stovnað 17. desember 1952.

Ilt er at vita, hvat teir hava hugsað hesir menninir, nú teir leitaðu út á Debesartøð stutt fyri jól. Bókasavnshúsini hava dagað upp niðanfyri og oman fyri lá henda lága nýggja norska barakkin, har nøkur rúm vóru innrætta í norðara enda. Annars var einki har umleið uttan trøðin rundanum húsini. Teir koma har í desembermyrktinum: gamli háskúlamaðurin og botanikarin Rasmus Rasmussen alias Regin í Líð, sum skrivaði fyrstu føroysku skaldsøguna, sum nú eisini heil doktararitgerð er komin burturúr, landbúnaðarrágevarin Hans Jacob Jacobsen, ið hevði skrivað grein um eplaálin, alias skaldið Heðin Brú, ið hevði tað gamla bóndasamfelagið undir húðini og dugdi so væl at lýsa samfelagsbroytingarnar í føroyska samfelagnum. Karsten Hoydal, fiskivinnufrøðingur, eisini hann eitt stórt skald og seinni eisini politikari. Axel Poulsen kommunulækni, ið kannaði tuberklar kemur eisini niðan eftir trøðni. Gamli Eiðislæknin R. K. Rasmussen, ið var vorðin viðagitin av tí sum hann hevði funnið fram um havhestasjúkuna, hevur eisini leitað sær út í Bátahøllina .

Christian Matras hevði ikki høvi at koma úr Keypmannahavn og helst hevur Niels à Botni, fuglafrøðingur, sum eisini hevði skrivað í ritið givið avboð. Teir tríggir H.D. Joensen, Jóannes Rasmussen Sverri Dahl eru helst komnir fram í góðari tíð, hava gjørt fundarhølið klárt og lagt fyrsta nummar av Fróðskaparritum við tí hátíðarliga eftirnavninum Annales Societatis Scientiarum Færoensis fram á borðið.

Har sita teir nú og smápráta í teirri nýinnrættaðu minnisstovuni Hans Andriasar Djurhuus og bíða til fundurin verður settur. Fundurin gekk skjótt og væl.

Eitt felag var stovnað sum hevði til endamáls at samstarva um vísindaligt virksemi, at geva út Fróðskaparit á føroyskum máli, at fáa til vega vísindaligar bókmentir og at leggja støði undir ein komandi lærdómsstovn í Føroyum

Nevndin skipaði seg sama kvøld á stovnandi aðalfundinum við Hans Debes Joensen, landslækna, sum formanni, Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingi sum næstformanni og Sverra Dahl, landsantikvari, sum kassameistara. Teir myndaðu nevnd felagsins øll árini líka til 1977, tá teir á sama aðalfundi løgdu frá sær í senn.

Tá var eg limur í felagnum, og tað kom satt at siga sum eitt sjokk fyri meg, at eg á aðalfundinum varð valdur ikki bert í nevnd felagsins saman við Høgna Debes Joensen og Johan Hendrik W. Poulsen, men eisini saman við Hans Jacob Joensen og Johan Djurhuus sum umboð felagsins í setursráðnum.

Á fyrsta fundi vóru tað bert menn, men seinni eru eisini komin fleiri konufólk í felagi. Bæði føroyingar og útlendingar kunnu verða limir í felagnum. Í mong ár var ein treyt fyri limaskapi, at tú skuldi hava skrivað grein í ritið ella hava givið út ritgerð í røðini Supplementa fyri at verða limur í felagnum. Tað var bókin Færøske sluppfiskere, sum veitti mær limaskap í felagnum í 1975. Síðani 1992, minnist meg rætt, er felagið vorðið meira demokratiskt og fleiri fólkum stendur í boði limaskap. Tað er ikki neyðugt at skriva grein fyri at verða limur, men sjálvandi eigur tað at verða ein moralsk skylda eisini at skriva í ritið.

Umframt at fáa Fróðskaparrit út á hvørjum ári, so tók felagið sær eisini av bókabýti og útvegaði hópin av bókum í býti fyri Fróðskaparrit og tær bøkur, sum komu út í røðini supplemanta. Eisini var Málstovnur Føroya Fróðskaparfelags settur á stovn í 1958 og við honum var skaptur ein karmur um tað orðasavn, sum sum kom á Føroyamálsdeildini, tá setrið varð stovnað. Málstovnur Føroya Fróðskaparfelags gav eisini út 2. útgávu av orðabókina hjá M.A. Jacobsen og Chr. Matras 1961. Umframt Fróðskaparrit var avgjørt eisini at geva út eitt meira populert rit um vísundi. Fyrsta blað av Frøði kom út í 1992.

Hvussu stórt bókaútgávuvirksemi felagsins hevur verið sæst best av frammsýning felagsins uppi í forhøllini her í Norðurlandahúsinum.

Fróðskaparfelagið skipaði fyri undirvísing á hægri stigi í føroyskum máli og bókmentum og í náttúrusøgu árini 1962 og 63. Hetta vóru tey fyrstu læraraskeiðini. Læraraskeiðini komu seinni at verða ein týðandi táttur í virksemi setursins. Tað var sera harmiligt, at tey vóru flutt frá setrinum til Landsskúlafyrisitingina. Felagið hevur verið sum ein kykna, sum hevði allar møguligar íløgur í sær.

Tað eydnaðist felagnum at fáa lærdómsstovnin í 1965, tá Fróðskaparsetur Føroya varð sett á stovn. Ætlanin var upprunaliga, at setrið skuldi verða stýrt av av nevnd við landsstýrismanninum, sum setrið hoyrdi undir, skrivstovustjóranum í landstýrinum og hinir tríggir skuldu veljast av Fróðskaparfelagnum. Við hesum hevði leiðslan verðið effektiv, men tað hevði helst ikki verið í tráð við tær leiðslu hugsjónir, sum vit hava í dag.

So kom heldur ikki at verða. Tað endaði við, at felagið kom at verða stýrt av tveimum fastum limum, rektaranum fyri studentaskúlan í Hoydølum og landsbókavørðinum, og trimum limum valdum av Føroya Fróðskaparfelag.

Setrið kom at taka nógva orku hjá Hans Debes Joensen og Jóannes Rasmussen, tí báðir sótu teir eisini í setursráðnum. Tað var soleiðis, at teir eisini máttu stríðast fyri at fáa fígging til bygging av setursúsunum uttan at landskassin lat eitt oyra í fyrstu syftu. Tað eydnaðist teimum eisini hesi húsini eru enn ein sjálvsognarpartur av setrinum.

Fróðskaparfelagið gav landinum nógva sjálvbodna arbeiðsmegi, bæði í sambandi við útvegan av peningi til bygging, útvegan av vísindaligum bókmentum, men eisini tí arbeiði hjá limum felagsins í setursráðnum var ólønt. Tað eru tey, sum halda, at tað ikki bar til at flyta annan fótin fyrr enn hin stóð tryggur, kanska var í so varið og var ein forðing fyri, at landið tók ábyrgd av vísindi og gransking. Lat tað fara. Fróðskaparfelagsfólkini fingu reist tey fyrstu seturhúsini í 1967.

Eg hevði tann heiður at sita í setursráðnum eisini undir le ancienne regime, sum tey, ið vóru í starvi á setrinum, ikki dámdu nakað serligt. Tað var eitt reint eksternt stýri, men so við og við komu limir felagsins at verða valdir millum lærarar á setrinum, so tað blíðkaði setursfólkini eitt sindur.

Við gomlu skipan var eitt rættiliga beinleiðis samstarv við landsstýrið. Felagið valdi skrivstovustjóran Johan Djurhuus til lim í ráðnum og landstýrismaðurin var vanliga á setursráðsfundi. Hann var sostatt væl kunnaður um tað, sum fór fram. Nú er ofta langt til landstýrismannin.

Eg minnist, at Johan Djurhuus einaferð skrivaði eina umsókn til landsstýrið sum formaður seturráðsins og seinni fekk setrið bræv frá landsstýrinum, har tað var sagt, at landsstýrið ikki kundi ganga umsóknini á møti á hesum sinni. Hetta bræv var eisini undirskrivað av Johan Djurhuus. Tá høvdu menn fleiri hattar og eina ódýra umsiting.

Hetta var alt broytt við seturslógini frá 1987. Tá var setrið loyst frá felagnum og kom at stýra sær sjálvum eins og onnur universitet, men nú við Mentamálaráðnum omanyvir sær.

Tað hevur verið eitt gott samband millum setrið og felagið. Føroya Fróðskaparfelag hevur verið forlag hjá setrinum og samstarvspartnari í sambandi við bókaútgávur og fyrilestrarrøðir.

Felagið hevur fullgjørt tað endamál, sum tað setti sær í 1952 — tað bæði væl og virðiliga. Tað er eisini so nógv annað virðiligt og tignarligt, sum er komið at hanga uppi í felagnum. Eitt nú Grunnur Kristjáns à Brekkumørk sum var stovnaður í 1982 við Ossian-heiðurslønini sum grundfæi. Í hesum sambandi ber tað til at bjóða einum kønum vísindafólki til Føroya at halda fyrilestur eins og grunnurin letur heiðursgávu til eitt fólk, sum hevur verið føroyska málinum til frama. Í gjárkvøldi (hósdagin, red.) hevði Anne-Kari Skarðhamar doktari fyrilestur um lyrikkin hjá Christiani Matras og Ingrið Sondum fekk handað sømdargávu úr Grunni Kristjáns á Brekkumørk, sum tann fyrsta kvinnan.

Eisini vil eg minna á, at felagið velir tvey umboð í Vísindagrunni Føroya Sparikassa. Ein grunnur, sum hevur havt sína góðu ávirkan á føroyska gransking á øllum økjum.

At røkja sambandi limana millum hevur verið tað, sum felagið kanska hevur gjørt minst burturúr. Limirnar hava fingið Fróðskaparrit og í sambandi við aðalfundin hevur vanliga verið eitt hugnaligt borðhald. Marner Simonsen segði mær einaferð, at felagið ikki fór so harðliga fram við veitslunum ta fyrstu tíðina. Kanska var tað tí, at felagið var so ungt, at teir mestsum hildu barnaføðingardag við lagkøku og kakao, men seinni kom meira lív í veitslurnar, ikki minst doktaraveitslurnar, sum kundu bera nógv skemtiligt í sær, tá lagið kom at verða serliga gott.

Tað var í mong ár siðvenja, at felagið helt veitslu fyri teimum, sum vunnu sær doktaraheitið, men hetta helt uppat fyri nøkrum árum síðani.

Men borðhaldið eftir aðalfundin hevur verið avbera gott, alt tað eg minnist, ikki minst síðani Hjalti í Jákupsstovu kom við tí nýggja frálíka siðinum at borðreiða við stoktum rivum og kókaðum eplum eftir aðalfundin.

Teir eldru limirnir settu altíð við nærveru síni ein hátíðarligan dám á felagið veitslukvøldini og vanliga vóru mangar góðar røður hildnar. Eg vil ongan nevna fyri ongan at gloyma, men eg eri fegin um at hava havt høvið at verið saman við øllum hesum fólkum, fleiri av teimum eru ikki okkara millum longur.

Teir tríggir Hanus, Mús og Sverri vóru sera ólíkir. Hanus var ein samansett persónsmenska, ein fanatikari, ein íbirtari og eitt ótrúligt arbeiðsjarn. Tá hann varð liðugur við borgarliga starv sítt setti hann seg, ofta eisini sunnumorgnar í Hans Andreassarstovu at arbeiða við málsligum og øðrum spurningum, sum høvdu hansara áhuga. Mús var rationalisturin, funktionalisturin og kanska eisini minimalisturin, grein ella fyrilestur frá hansara hond var ikki eitt orð longur enn neyðugt. Hann skuldi einaferð halda ein fyrilestur í eini røð um Føroyar, men hann boðaði frá, at fyrilesturin ikki var longur enn hálvan tíma. Roynt var at fáa hann at toyggja evnið til ein tíma, men tað var vónleyst. Onkur annar mátti finnast til at tosa hina helvtina av tíðini.

Jóannes gekk eitt sindur hart á meg um Fróðskaparrit, beint tá eg var komin í felagsnevndina. Hann hevði givið mær ein lítlan seðil við nøvnum og titlum á møguligum greinum. Eg minnist ikki, hvat tað var, men hann hevði sagt okkurt við meg, so eg varð í øðini og loysti av. Aftaná var eg púra fyri ongum. Tað vildi so til, at eg sama dag um døgurðatíð rendi meg beint í Jóannes. Hann steðgaði á. Eg var heitur um oyruni og keddur av, at eg ikki hevði stýrt mær. Men hann stóð har og smíltist: Nú gamli, tað er krút í tær. Tað hevði eg ikki væntað. Eftir henda dag vóru vit bestu vinir.

Sverri var bæði av útsjónd og sinni meira dionysiskur og sangvinskur, men eisini tykkin og takksamur fyri hvørt positivt orð. Einaferð eg hevði lisið okkurt, sum hann hevði skrivað um føroyska árabátin, legði eg ein seðil til hansara og skrivaði positivt um greinina. Nakrar dagar seinni kom Sverri inn á skrivstovu mína, tárini trillaðu niður eftir kjálkunum, så fegin var hann um hetta lítla positiva, eg hevði skrivað um hann.

Ein dag kom hann inn á skrivstovu mína og segði avgjørdur. Vit fara í føðingardag hjá Heðin Brú. Tú koyrir. Heðin Brú var blíður og tíður og Sverri bað meg koyra runt í býnum við sær. Veðrið var gott, og hann lá hálvur út gjøgnum rútin ogi rópti dudderidud ella hvat tað, eg minnist ikki heilt fonetikkina, eftir øllum vøkrum konufólkum, sum vit komu framvið. Hetta høvdu Hanus og Músin tó neyvan gjørt.

Tað er ein maður sum eg ikki nevni fyrr enn nú. Tað var Christian Matras. Hann var ikki tann, sum hevði so nógv við tað praktiska at gera, men hann var mestsum ein andaligur faðir ella ein profetur aftanfyri. Ein friðarligur karismatiskur maður, sum ikki gjørdi nógv burturúr sær sjálvum. Eg minnist fleiri ferðir at hava hoyrt hann sagt, hvussu fegin hann var um, at Hanus og Músin høvdi fingið hann heim til Føroya. Ein stak fittur maður, Christian, og tað var koma hansara Marianna eisini. Blíð og fjálg fólk.

Føroysk gransking og føroysk vísindi hevur ment seg nógv síðani 17. desember 1952. Tað er bæði galdandi fyri setrið og fyri hinar granskingarstovnarnar. Tað hevur eydnast eitt nú Hjalta í Jákupsstovu at kyrra hópin av toppkvalifiseraðum vísindafólkum at sær, sum í starvi sínum hava vunnið sær doktaraheiti og sum standa á odda fyri altjóða gransking á ávísum økjum. Tað sama kann sigast um søvnini. Tað er hent og hendir alsamt nógv. Eg vóni, at teir, sum ráða, gáa eftir øllum tí framburði, sum er hendir, hóast málið ikki er rokkið enn, tí heimurin rundanum okkum krevur alsamt størri og størri fróðskap.

Tað sáðið, sum felagi hevur sáðað, hevur havt góðar ílegur og borið góðan ávøkstur á mestum øllum økjum. Tað er at frøðast um. Tað er enn brúk fyri felagnum. Tað eigur sítt fasta pláss í føroyska vísindaumhvørvinum.

Tað er so nógv annað og nógv gott, ið eg kundi sagt um øll tey frálíku fólkini, sum hava lagt arbeiðsorku í felagið hesi mongu árini síðani 1977, tá teir gomlu løgdu frá sær. Formonnum, nevndarlimum, ritstjórum, rithøvundum og so framvegis. Hesi fólk eiga so sanniliga sín stóra part í tí, sum er hent í tí føroyska granskingarumhvørvinum. Tey hava øll meira ella minni gjørt vart við seg í føroyska samfelagnum. Kanska eru øll ikki samd í tí, sum tey hava borið fram ella tí, tey standa fyri, men tað ger einki. Tað er gott við fjølbroyttum tankavirksemi í einum samfelag.

Hesi eiga øll stóra tøkk uppiborna, tí teirra arbeiði liggur ikki eftir. Verk teirra tala fyri seg. Skuldi eg nevnt tey øll og teirra avrik, so varð eg ikki liðugur í dag. Tey verða eisini umrødd í 50 ára minningarritinum, sum felagið gevur út í hesum døgum.

Takk fyri tann heiður, sum mær er sýndur við at sleppa at halda røðu henda dag. Eg vil ynskja formanninum Dánjal Peturi Højgaard og ikki minst skrivara felagsins, Maud Heinesen, hjartaliga til lukku við teimum fimmti árunum og alt tað besta í árunum, sum koma.



*"Eg var so heppin at vera millum teir studentar, sum sumrini 1967 og 68 savna inn lutir og frásagnir av manna munni ymsastaðni í Føroyum fyri Innsavningarnevnd Fróðskaparsetursins. Hetta kom eisini at hava stóra ávirkan á mína egnu lívsleið og á lívsstarv mítt.*
*Hetta var sama ár, sum nýggju setursúsini, har Føroyamálsdeildin nú einsamøll heldur til, vórðu tikin í nýtslu. Satt at siga, hevði eg tá ikki rættiliga skil á, hvat var Fróðskaparsetur, Fornminnissavn ella Fróðskaparfelag. Alt var blandað saman hjá mær, sum hjá mongum øðrum. At Føroya Fróðskaparfelag var tað samlandi, kom eg at ásanna seinni"*